# Fosturtøka í Føroyum

## – Lóggávan, hugburðir og kjakið

SLET IKKE

Denne lov gælder for Færøerne

JAVNAÐARFLOKKURIN
á Fólkatingi

August 2017

Kjakið um fosturtøku hevur mangan verið hart. Og tað er tað onki at siga til, tí tað nemur við fleiri grundleggjandi viðurskifti, sum fólk flest hava nógvar – og ofta sterkar – meiningar um.

Men hvussu er føroyska lóggávan á økinum? Og hvussu verður hon praktiserað? Hvat kunnu vit siga um hugburðin í Føroyum til spurningar, ið viðvíkja fosturtøku? Og hvat hevur eyðkent kjakið í almenna rúminum?

Hesar spurningar hava vit við hesum ritið roynt at kanna og greina. Vónin er, at tað kann vera eitt dygdargott ískoyti hjá øllum – uttan mun til politiskan lit ella sannføring – nú kjakið um fosturtøku av álvara hevur tikið seg upp aftur.

**Javnaðarflokkurin á Fólkatingi**

*August 2017*

# Kjakið um fosturtøku má snúgva seg um veruleikan - ikki bara statistikkin

Tað er allar fyrsti dagur hjá Donald Trump í embætinum sum forseti. Hann situr við tað tunga skrivaraborðið í Hvítu Húsunum og skrivar undir eitt skjal, meðan sjey aðrir menn standa og hyggja at við bæði álvarsomum og smílandi eygnabrá.

Tað, forsetin setir sítt navn undir, eru eini boð sum hava við sær, at allir felagsskapir, sum arbeiða við heilsu og fáa stuðul úr USA, formliga skulu vátta, at teir ikki fremja ella á nakran hátt ráðgeva um fosturtøku. Hetta snýr seg um felagsskapir sum arbeiða í heimsins fátækastu londum, har teir ráðgeva um heilsu, fyribyrging, og stríðast móti sjúkum sum Malaria og HIV. Í hesum londum er vanligt, at ***heilt ungar gentur verða við barn við nógv eldri monnum, sum tær síðani verða tvingaðar at gifta seg við, og sostatt missa møguleika fyri bæði útbúgving og starvi. Tí verða nógvar fosturtøkur framdar í desperatión og á sera ótryggan hátt.*** Og tí geva nakrir av heilsufelagsskapunum, sum arbeiða við fyribyrging, eisini ráð um, hvussu og hvar tryggar fosturtøkur kunnu fremjast.

Teir missa nú allan stuðulin úr USA. Harumframt hevur Trump-stjórnin gjørt av at steðga stuðlinum til “The UN Population Fund”, sum m.a. letur fyribyrgjandi evni til kvinnur í flóttafólkalegum og krígsøkjum, eins og ætlanin er at steðga øllum stuðli til familjuplanlegging í fátøkum londum. Orsøkin er greið: Ein avgerandi partur av dagsskránni hjá tí sonevnda “kristna høgra” í USA er at steðga fosturtøku. Tey stuðlaðu Trump í valstríðnum – og nú, á hansara fyrsta degi í embætinum, fáa tey valuta fyri pengarnar:

Eitt heimsumfatandi átak ímóti fosturtøku og betri sexualmorali.

Um átakið fer at hava við sær færri fosturtøkur, er kortini ivasamt. Tá felagsskapir, sum stuðla fátækum kvinnum við m.a. fyribyrging missa sína fígging, verða nógv fleiri ungar kvinnur uppá vegin – og fleiri teirra fara at fáa fosturtøku. Felagsskapurin Marie Stopes International roknar við, at úrslitið av politikkinum verður, at umleið 660.000 fleiri fosturtøkur framdar komandi fýra árini bara í Nigeria – og at einar 10.000 kvinnur fara at doyggja orsakað av hesum.

Hetta grundað tey á talið av kvinnum, sum fáa stuðul og ráðgeving hvørt ár, og á úrslitið av sama politikki, sum varð førdur frá 2001 til 2008, tá George Bush var forseti. Tá hækkaði talið av fosturtøkum sunnanfyri Sahara munandi, tá nevndu felagsskapir mistu stuðulin úr USA.

**Lógin og veruleikin**

Hetta vísir ein púra avgerandi veruleika, sum aldrin má gloymast, tá vit fara undir ta trupla og kensluborna kjakið um fosturtøku í Føroyum: Fosturtøka er ein veruleiki. Eitt land kann lóggeva ímóti fosturtøku og breggja sær av síni "reinu" lóggávu – men slík lóggáva kávar altíð útyvir ein veruleika, sum ikki er so reinur og einfaldur. Tí antin fara desperatar kvinnur í onnur lond at fáa fosturtøkur framdar – ella verða tær framdar ólógliga og mangan a vandamiklan hátt. So tá fólk seta fosturtøkuspurningin upp sum ein einfaldan ja ella nei spurning, so er tað ein følsk uppseting.

Í august 2017 setti ungmannafelag Javnaðarfloksins, Sosialistisk Ung (SU), hol á hetta týdningarmikla kjakið við eini viðtøku sum segði, at felagið vil virka fyri fríari fosturtøku í Føroyum. Hetta elvdi straks til eitt kjak, har bæði politikarar og privatfólk góvu sína støðu til kennar.

***Tað er viðkomandi at seta spurningin á skrá beint nú, tí á ólavsøku næsta ár taka Føroyar fulla ábyrgd av persóns- og familjurættinum – og uppi í tí hoyrir lóggávan um fosturtøku.***

Hetta er beinleiðis orsøkin til, at Javnaðarflokkurin á Fólkatingi hevur tikið stig til at gera hetta lítla kjakuppleggið.

Sjálvur haldi eg ongan iva vera um, at vit, tá málið er yvirtikið, skulu gera okkara egnu lóg. Men fyrst mugu vit tora at hava eitt opið kjak um spurningin.

Og tað er ikki lætt!

Spurningurin um fosturtøku er ein tann eymasti, sum er. Hann snýr seg bæði um sosialpolitikk, familjupolitikk, religión, javnstøðu, moral, filosofi og biologi.

***Eingin lóg kann endurspegla allar hugsanir og metingar, men við lógini kann bara ein loysn veljast – og nøkur, sum hava sterkar kenslur um spurningin, fara at halda, at lógin ikki umboðar teirra sjónarmið.***

Verandi lóg er frá 1956. Og sum hetta rit vísir, er hon ikki bara gomul – tað er eisini ivasamt, um hennara orðingar yvirhøvur verða fylgdar. Tað mest áhugaverda úrslitið í kanningini er kanska júst, at bara ein av fimm halda, at lógin verður hildin. Við øðrum orðum: Nógvir føroyingar halda rætt og slætt, at lógloysi valdar í økinum.

Uttan mun til, um henda fatan er røtt ella ikki, so kunnu vit ikki liva við hesum. Vit skulu skipa okkum sambært lóggávu - og fólk mugu hava álit á, at tað er tað, vit gera.

Sum rættarsamfelag hava vit sostatt ein trupulleika. Og hann kundu vit væl havt gjørt okkurt við fyri tað, um lóggávuvaldið formliga er danskt. Men í staðin fyri at gera greiðar reglur, hevur Løgtingið givið læknum so stórt rásarúm at tulka lógina, at nógv halda teirra meining vera landsins lóg. Tað máar støðið rættarsamfelagnum - og tað er ikki læknunum, men politisku myndugleikunum fyri at takka.

**Vantandi dirvi**

Hví hava skiftandi landsstýri og løgting latið hetta ganga so leingi? Eg rokni við, at orsøkin snøgt sagt er vantandi dirvi til at nema við henda eyma spurning.

Tí øll vita, at orðaskiftið verður harðligt. Og eingin vil leggjast undir at vilja loyva "barnadrápi". Eingin vil leggjast undir at vilja "taka rættin frá kvinnum at ráða yvir egnum kroppi".

Í staðin fyri at fara undir eitt opið kjak, er lok lagt á hesa kókandi grýtuna. Og tað er ikki virðiligt.

***Viðhvørt er fólkaræði trupult. Viðhvørt svíða orðini sum verða søgd, tá vit seta eitt mál á skrá. Men skulu vit vera eitt rættarsamfelag, so mugu vit tora at taka ábyrgdina á okkum, og antin banna, loyva, ella í ávísum førum loyva fosturtøku við okkara egnu, fólkaræðisligu viðtøkum.***

Landsstýrið hevur boðað frá, at eingin ætlan er um at gera eina føroyska lóg í sambandi við yvirtøkuna av økinum.

***Men sum henda kanning vísir, so halda føroyingar, at vit skulu hava okkara egnu lóg.*** Og fyrr ella seinni má ein føroysk lóg koma í staðin fyri ta donsku frá 1956.

Og sum vit hava sæð farnu tíðina, so er óttin fyri at siga sína meining um hetta ikki so stórur, sum hann hevur verið. Djørv politisk ungmannafeløg á báðum síðum hava sett hol á kjakið, og eg vóni, at fólk komandi tíðina bæði fara at siga sína meining – og lurta eftir meiningunum hjá øðrum. Vit mugu royna at skapa eitt kjak, sum – hóast tað verður hart – eisini verður sakligt og upplýsandi.

Sjálvur havi eg onga avgjørda meining um, hvussu ein føroysk lóg skal síggja út. Men eg vóni ikki at vit detta í eina fellu sum minnir um hana, Donald Trump datt í á fyrsta arbeiðsdegi sínum: At vit vaska okkara hendur við eini lóg, sum fullkomiliga bannar fosturtøku, men lata eyguni aftir fyri tí veruleika, at fosturtøka er ein veruleiki kortini.

**Bann er ikki vegurin**

Eitt fullkomið bann hevði havt við sær, at ein kvinna, sum er komin illa fyri, als ikki hevði vent sær til føroyskar læknar, felagsskapir ella myndugleikar við fyrispurningi um fosturtøku – tí hon hevði kent svarið frammanundan. Samfelagið hevði mist sambandið við hesa kvinnu – og harvið eisini møguleikan fyri at veita henni hjálp og ráðgeving.

Í staðin hevði hon kanska farið beint til Danmarkar, har eingin spyr um nakað, og fosturtøkan er einføld at fremja...

Við øðrum orðum: ***Við einum banni hevði okkara lóg verið "rein" og okkara statistikkur somuleiðis. Fosturtøkur hjá føroyskum kvinnum høvdu horvið úr almannaeygum – men tær høvdu ikki horvið úr veruleikanum.***

Og kanska høvdu okkara – í norðurlendskum høpi – metlágu tøl í veruleikanum hækkað heldur enn lækkað... Endamálið má ikki vera, at vit skulu kunna vísa til eitt null í almenna statistikkinum, men at veruligu tølini skulu vera so lág sum gjørligt.

***Vónandi fara fólk eisini at hava í huga, at ikki so fáar kvinnur í Føroyum hava fingið fosturtøku. At kalla tær ókvæmisorð, gagnar ikki kjakinum.***

Eg vóni eisini at fólk á hinari síðuni fara at hava virðing fyri tí veruleika, at hetta er eitt sera álvarsamt og torgreitt mál – og at tað viðkemur øllum. At skera øll tey etisku aspektini burtur, og gera hetta til eina og aleina at vera ein spurning um rættin hjá teirri einstøku kvinnuni at ráa yvir egnum kroppi, ber ikki til.

Loyva vit fosturtøku í okkara lóg, so hava vit sum demokratiskt samfelag øll ábyrgd av tí, sum hendir við støði í lógini. ***Banna vit fosturtøku, hava vit øll ábyrgdina av teimum avleiðingum, tað hevur við sær. Tí hava øll – og ikki bara kvinnur – rætt at siga sína hugsan um spurningin.***

Hóast SU er fyri fríari fosturtøku, hevur Javnaðarflokkurin onga flokspolitiska støðu til málið, men letur hvønn einstakan taka støðu. Tí er alt, eg sigi her, fyri egna rokning.

Men at vit eiga at kjakast um og taka støðu til spurningin, rokni eg ikki við, at tað eru fleiri meiningar um – hvørki í Javnaðarflokkinum ella í øðrum flokkum. Spurningurin er bara um vit tora og duga...

Eg vóni, at hetta lítla rit kann vera við til at birta uppundir eitt opið, sakligt og realistiskt kjak. Tað er ikki ætlað at røkka einum ávísum politiskum endamáli, men kann vónandi vera eitt íkast, sum allir partar kunnu brúka í kjakinum – eitt kjak, sum vónandi fer at halda áfram og taka dik á seg komandi tíðina.

Tey, sum hava staðið fyri arbeiðinum, eru Guðrun Durhuus, Jóan Pauli Dahl Jakobsen og Janus Haraldsen.



**Sjúrður Skaale, fólkatingsmaður**

# Lóggávan

Ein fortreyt fyri at kjakast um, hvussu lóggávan eigur at vera, er at vita, hvussu hon er. Vit hava tí roynt at savna saman eina stutta og greiða lýsing av verandi lóggávu.

Lóggávan um fosturtøku í Føroyum er eitt felagsmál sambært heimastýrisslógini, men verður yvirtikin tá persóns-, familju og arvarætturin skulu yvirtakast – væntandi á Ólavsøku 2018.

Tann føroyska fosturtøkulóggávan er tann danska lóggávan frá 1956, ið varð sett í gildi í Føroyum í 1959. Tær broytingar, ið hava verið framdar í lóggávuni síðani 1956 (í 1968, 1988 og 2009), hava ikki broytt grundarlagið fyri, nær fosturtøka kann fremjast.

> ***Visti tú at...?***
>
> Í Danmark varð lógin sett úr gildi í 1956, tá ið frí fosturtøka varð loyvd. Núverandi danska lóggávan ber í sær, at kvinnan fram til 12. viku kann fáa fosturtøku, um hon ynskir tað. Kvinnan kann eisini fáa kunning um, hvørjar møguleikar hon hevur, um fosturtøkan ikki verður framd. Eisini skal kvinnan bjóðast eina stuðulssamrøðu áðrenn og aftaná fosturtøkuna.

**Orsøkir?**

Í Føroyum kann fosturtøka loyvast í fýra førum:

**1. Medisinsk orsøk**

Tann medisinska orsøkin loyvir fosturtøku, tá ið vandi er fyri lívi ella heilsu hjá kvinnuni. Atlit skulu takast til um kvinnan hevur likamligar ella sálarligar avbjóðingar og um beinleiðis vandi

er fyri, at likamliga og sálarliga støðan hjá kvinnuni kann vikna. Atlit kunnu eisini takast til umstøðurnar, ið kvinnan livir undir (sonevndar sosialar orsøkir). Hetta kann kortini ikki standa einsamalt, men skal samanhaldast við eina medisinska orsøk.

**2. Etisk orsøk**

Tann etiska orsøkin loyvir fosturtøku um kvinnan er vorðin við barn orsaka av neyðtøku ella blóðskemd (incest).

**3. Eugenisk orsøk**

Tann eugeniska orsøkin loyvir fosturtøku, um fostrið er í beinleiðis vanda fyri at fáa álvarslig likamlig ella sálarlig brek orsaka av arvaligum sjúkum ella skaða í móðurlívinum.

**4. Onnur, serstøk orsøk**

Hesar støður fevna um støður har kvinnan ikki verður mett før fyri at taka sær av barninum orsaka av likamligum ella sálarligum brekum, ella av aðrari læknaligari orsøk.

**Hvør?**

Avgerðin um at fremja fosturtøku skal takast í samráði ímillum tveir løggildar læknar. Vanliga er tann eini kommunulækni hjá kvinnuni. Kommunulæknin sendir kvinnuna á Landssjúkrarhúsið har ein serlækni metir um støðuna og tekur eina endaliga avgerð.

*Visti tú at...?*

Tá 1956-lógin var galdandi í Danmark varð avgerðin um fosturtøku tikin í samráði millum tveir læknar og eitt umboð frá einari "mødrehjælpsinstitutión". Hesar "mødrehjælpsinstitutiónirnar" høvdu til uppgávu at vegleiða kvinnum um at vera við barn, um barnsburðin sjálvan og um tað at vera mamma. Ráðgevingin fevndi um alt fra persónligari, sosialari og løgfrøðiligari ráðgeving til námsfrøðiliga og heilsufrøðiligaráðgeving. "Mødrehjælpsinstitutiónin" skuldi vera tann fyrsti stovnurin, ið kvinnan vendi sær til, tá hon ynsktu fosturtøku. Stovnurin kannaði síðani um treytirnar fyri fosturtøku vóru loknar. Ein slíkur stovnur er ikki settur á stovn í Føroyum.

**Nær?**

Sambært lógini ber tað ber til at fáa framt fosturtøku fram til 16. viku í Føroyum.

Praksis í Føroyum hevur tó í nógv ár verið, at fosturtøkan bert kann fremjast til 12. viku. Tað er ikki heilt vist, hví markið ikki er tað sama sum stendur í lóggávuni, men sambært Katrini Kallsberg serlækna í kvinnusjúkum á Landssjúkrarhúsinum, so er tað helst ein samanrenning av fleiri orsøkum.

Millum annað hevur tað áður verið soleiðis, at tann kirurgiska fosturtøkan (sonevnd útskaving) varð nýtt framm til 12. viku, og aftaná 12. viku hevur tað verið  medisinskt í teimum skandinavisku londunum. Tað hevur ikki eydnast fáa greiðu á, hvør nágreiniliga løgfrøðiliga heimildin er til at gera hetta frávík í mun til lógarinnar tekst.

Sambært lógini er tað vanliga ikki loyvi at fremja fosturtøku eftir 16. viku. Dømi um fosturtøkur, ið kunnu fremjast eftir viku 16 er eitt nú staðfesting av, at barnið ber deyðiligt brek og ikki kann liva uttanfyri móðurlívið.

**Treytir?**

Serligar treytir verða ikki settar ógiftum kvinnum omanfyri 18 ára aldur.

Um kvinnan er gift skal makin hava høvi at úttala seg, uttan so at serlig atlit tala ímóti hesum.

Er kvinnan ógift og undir 18 ár, skal tann, ið hevur foreldramyndugleikan, geva sítt samtykki, uttan so at týðandi atlit tala ímóti hesum.

> "Kommunulæknin segði, at hon stuðlaði mær, óansæð hvat eg valdi, og at tað var púra upp til mín. Læknin á Landssjúkrahúsinum, hinvegin, segði, at eg var alt ov ung og ikki klár at fáa eitt barn."
>
> *- Kvinna, 19 ár, ið fekk fosturtøku og áður hevur áður havt avbjóðingar við sálarligari heilsu*

Ber ikki til hjá kvinnuni at skilja týdningin av inntrivinum, er hon sálarliga sjúk, hevur hon vantandi psykiskar eginleikar, er hon veik orsakað heilsutrupulleikum ella av øðrum orsøkum, kann ein verji seta fram umbøn um fosturtøku. Hesar treytir kunnu tó frávíkjast, um vandi er fyri lívi og heilsu hjá kvinnuni vegna sjúku.

**Ráðgeving og vegleiðing**

Í oktobur í 2007 var eitt ráðgevandi toymi fyri kvinnur, Sjálvhjálpin, sett á stovn. Endamálið var at veita ráðgeving til barnakonur, ráðgeving til kvinnur, ið umhugsa fosturtøku og at hava samrøður við kvinnur, ið hava fingið fosturtøku. Harumframt var endamálið at veita upplýsing um fyribyrging til bæði ung og vaksin. Umsitingin var áður hjá Kvinnuhúsgrunninum, men varð í januar 2014 flutt til Gigni, sum er ein stovnur undir Heilsu- og Innlendismálaráðnum.

**Hagtøl og hugburðskanning**

Fólk flest hava eina meira ella minni greiða hugsan um fosturtøkuspurningin. Kortini eru bert fáar kanningar gjørdar um, hvat føroyingar halda um hendan spurningin. Javnaðarflokkurin á Fólkatingi hevur tí gjørt av at seta eina slíka kanning í verk. Endamálið hevur verið at fáa til vega ítøkiliga vitan um hugburðin hjá føroyingum til fosturtøkuspurningin.

# Hagtøl og kanningar

Hagtølini frá 1994-2014 vísa, at árliga eru í meðal 42,2 fosturtøkur framdar í Føroyum, svarandi til 64,3 fosturtøkur fyri hvørji 1.000 livandi fødd. Tølini vísa eisini, at talið av fosturtøkum hevur verið støðugt fallandi hetta tíðaskeiðið.

Samanborið við okkara norðurlendsku grannalond hava Føroyar ivaleyst tað lægsta talið av fosturtøkum pr. 1000 livandi fødd.

Í Føroyum vóru 56,6 fosturtøkur í miðal frá 2009-2013 pr. 1000 livandi fødd. Síðani er eitt fitt lop til Finnland, sum við 172,2 fosturtøkum í miðal frá 2008-2012 hevur tað næstlagsta talið av fosturtøkum pr. 1000 livandi fødd. Hægsta talið av fosturtøkum pr. 1000 livandi fødd er í Grønlandi, har heili 979 fosturtøkur verða framdar pr. 1000 livandi fødd. Samanborið við føroysku tølini eru tey grønlendsku tølini heili seytjan ferðir hægri. Í Danmark verða framdar 261 fosturtøkur pr. 1000 livandi fødd, tað svarar til meira enn fýra ferðir so nógv sum í Føroyum.



Ein orsøk til at tað føroyska talið er lægri enn í hinum Norðurlondum kundi hugsast at verið føroyska fosturtøkulóggávan – í Danmark, Norra, Svøríki og Grønlandi er frí fosturtøku. Í Íslandi og Finnlandi er lóggávan munandi linligari enn tann føroyska.

Talið av fosturtøkum í Føroyum er sum nevnt munandi lægri enn í hinum Norðurlondunum, og yvir eitt áramál sæst eisini, at talið støðugt er lækkandi. Ein frágreiðing kann vera, at kvinnur velja at fara til Danmarkar at fáa sær fosturtøku, men av tí at ongi tøl eru fyri, hvussu nógvar kvinnur búsettar í Føroyum fáa framt fosturtøku í Danmark, ber illa til at siga um tað í veruleikanum er so.




*Kelda: Heilsulýsing Landslæknans 2014*

Ein serlækni á økinum vísti harafturat herfyri aftur, at talan kann vera um nógvar kvinnur. Ein ávísur partur av kvinnum, sum hava fingið framt fosturtøku, hava tørv á læknaligari viðgerð. Um kvinnurnar koma aftur til Føroya eftir fosturtøkuna høvdu føroyskir læknar sostatt komið í samband við tær – men heilsuverkið upplivir ikki, at slíkir sjúklingar leita sær hjálp.

> ***Visti tú at...?***
>
> Gigni veitur anonyma ráðgeving um fosturtøku, bæði umvegis telefon, teldupost og við persónligari samrøðu. Um tørvur er á tí, kann Gigni rinda fyri samrøðu við ein sálarfrøðing viðvíkjandi fosturtøkuni.

Hagtøl í Norðurlondum (og í Føroyum) vísa, at tað eru flest kvinnur í aldrinum frá 20-24 ár, ið fáa fosturtøku. Tað kann tí eisini hugsast, at fleiri av føroysku kvinnunum, ið eru búsitandi í Danmark í lestrarørindum í aldrinum frá 20-24 ár, hava fingið framt fosturtøku í Danmark, og at hetta tí ávirkar tølini fyri fosturtøkur framdar í Føroyum.

Sera fáar kanningar eru gjørdar av, hvørja støðu føroyingar hava til fosturtøkuspurningin.

Ein kanning í Dimmalætting tann 27. juni 1992 vísti, at 70 prosent av teimum 500 spurdu vóru ímóti fríari fosturtøku, meðan hini 30 prosentini vóru fyri. Kanningin vísti, at yngri fólk og fólk í Suðurstreymoy vóru mest fyri fríari fosturtøku. Harafturímóti vóru eldri fólk og fólk í restini av landinum mest ímóti. Ongin munur sást á hugburðinum millum ávíkavist kvinnur og menn.

Dimmalætting almannakunngjørdi 22. apríl 1998 eina aðra kanning, har 1.669 fólk vórðu spurd. Kanningin varð gjørt í kjalarvørrinum av rættiliga sjónligari mótstøðu móti fosturtøku í Føroyum.

Í kanningini vórðu "sjúka" og "sosialar orsøkir" býttar upp í tveir spurningar. Sum sosial orsøk var nevnt "*at mamman er alt ov ung ella at neyðtøka er framd*". Uppá spurningin "*Kann fosturtøka fremjast vegna sjúku?*" svaraðu 45 prosent "Ja". Uppá spurningin "*Kann fosturtøka fremjast av sosialum ávum?*" svaraðu 14,5 prosent "Ja". Dimmalætting kannaði eisini hugburðin til at banna fosturtøku og til at loyva fríari fosturtøku.

Úrslitið varð, at 13 prosent vildu banna fosturtøku, meðan 18 prosent vildu seta í verk fría fosturtøku.

Í juni 2002 gjørdi Gallup eina kanning fyri Fregnir, sum vísti, at 14 prosent vildu banna fosturtøku og níggju prosent vildu seta í verk fría fosturtøku. Væl fleiri – 19 prosent – ynsktu eina herda lóggávu, meðan sjey prosent ynsktu at seta linari krøv. Tey flestu, tilsamans 35 prosent, vildu varðveita verandi lóggávu.

Aðrar viðkomandi kanningar eru – okkum kunnugt – ikki gjørdar síðani.

*Óvissur*

Sonevndi fosturtøkuspurningurin er í grundini ikki *ein* spurningur. Talan er heldur um fleiri týðandi og ofta viðkvom viðurskifti, ið eru trupul at fevna í einføldum ja/nei-spurningum. Samstundis kann tað vera ógvuliga ymiskt, hvussu fólk skilja ella hvat fólk leggja í ymisk orð.

Sum dømi kann nevnast orðið *neyðtøka*. Mann kann hava ta fatan, at fyri at talan skal vera um neyðtøku, skulu eitt ella fleri viðurskifti kunna staðfestast. Talan kann eittnú vera, at haldgóð prógv skulu vera fyri neyðtøku, at brotsgerðin skal vera meldað til løgregluna, at løgreglan skal hava sett kanningar í verk og so framvegis. Hinvegin kann mann hava ta fatan, at tað má vera upplivingin hjá kvinnuni av støðuni, ið skal vera avgerandi – at tað til dømis eigur at vera nóg mikið, at kvinnan sigur seg vera neyðtikna, hóast bert læknin fær hetta at vita.

Tað sama kann eisini sigast um hugtakið "at banna" nøkrum, so sum fosturtøku. Tey flestu skilja eitt bann á tann hátt, at nakað ikki er loyvt ella ikki ber til. Hinvegin eru nógvar støður, har ein verður noyddur til ella har tað er skilabest at gera ímóti banninum. Til dømis at koyra yvir reytt ljós ella leypa í svimjihylin í gerandisklæðum. Tað er ikki loyvt, men tó kann vera bæði neyðugt og skilagott, um tú eittnú hevur ein álvarsliga sjúkan persón í bilinum ella um onkur er um at drukna. Á sama hátt kann eisini eitt bann móti fosturtøku skiljast ymiskt.

Harumframt er í einari slíkari kanning neyðugt at seta spurningar, ið kunnu koma tí einstaka so nær, at tey antin ikki ynskja at svara ella velja at siga ósatt. Av somu orsøk er svarmøguleikin "Veik ikki/ Vil ikki svara" í summum førum settur í staðin fyri "Veit ikki".

Ein onnur grundleggjandi avbjóðing við at gera eina slíka kanning er – eins og við øllum øðrum spurnar- og veljarakanningum – at orða spurningar og svarmøguleikar á ein hátt, ið ikki tilvitað ella ótilvitað skeiklar úrslitið. Nógv orka er tí løgd í at gera orðingarnar so objektivar og greiðar sum gjørligt. Kortini kann spurnartekin óivað setast við, hvussu kanningin ella partar av henni er gjørd. Til tess at tryggja, at lesarin hevur eitt haldgott grundarlag at meta um kanningina, verða øll úrslit løgd fram alment á heimasíðu okkara www.jaf.fo. Lesarin hevur tískil møguleika at kunna seg í fulla dátagrundarlagnum fyri kanningini.

Inni á heimasíðuni verður eisini møguligt at síggja sonevndu signifikansvirðini fyri til dømis aldur, kyn, útbúgving, politiskan flokk og bústað. Tað er til dømis, hvussu stóran týdning tað hevur, at tann, sum svarar er miðalaldrandi maður, búsitandi í Suðurstreymoy við miðallangari útbúgving í mun til eittnú at vera ein ung kvinna úr Sandoy við stuttari útbúgving og øðrvísi politiskum liti.

Um teir fyrstu tríggjar spurningarnar er í flestu førum signifikantur samanhangur funnin um, hvussu kyn, aldur og bústaður hava ávirkan á, um mann kennir fólk sum hava fingið fosturtøku, um ein veit um dømi har fosturtøka er framd uttanfyri lógarinnar karmar, ella um ein heldur fosturtøkulógin skuldi verðið dagførd.

Til spurning fýra og fimm fellur signifikansurin rættiliga nógv, og tí ber ikki altíð til reint statistiskt at staðfesta ein samanhang millum omanfyrinevndu mátini. Sostatt ber ikki heilt til at siga, um til dømis politiskur litur kann fortelja okkum, hvussu ein luttakari heldur, at ein nýggj fosturtøkulóggáva skuldi sæð út. Hetta fallið í signifikansi var tó væntað, millum annað tí ein stórur partur av luttakarunum antin svara “frí fosturtøka skal loyvast” ella “fosturtøka skal bannast” uppá spurning fýra og sostatt ikki taka støðu til spurning fimm.

Viðvíðkjandi eittnú landafrøðiligari býtinum skal fyrivarni eisini takast í mun til summi úrslit. Fyri ávikavíst Norðurstreymoy, Sandoy og Vágar er talið av luttakarunum for lágt til, at ein kann siga nakað við vissu um, hvørt ella hvussu hugburðurin í hesum økjum er øðrvísi enn aðrastaðni í Føroyum. Fyri hini økini eru tó fleiri fleiri luttakarar og tískil eru úrslitini meira umboðandi fyri hesi øki.

### Visti tú at...?

Ráðgeving um fosturtøku er ein partur av arbeiðinum hjá heilsufrøðingunum, eisini í fólkaskúlunum. Heilsufrøðingurin arbeiðir undir

# Hugburðskanning

## Um kanningina

Kanningin er gjørd í samstarvi við greiningarfyritøkuna Lóður. Fyritøkan hevur í tíðaskeiðnum 14. juni 2017 til 25. juni 2017 spurt tilsamans 532 fólk fimm spurningar við tilsamans 22 svarmøguleikum, harav níggju í einum spurningi. Frammanundan vórðu luttakararnir í stuttum kunnaðir um verandi lóggávu um fosturtøku í Føroyum.

# Vitan um framdar fosturtøkur

Talan er um ein opnan spurning, ið letur upp fyri at alt frá ítøkiligari vitan til leysasøgur kann telja sum eitt "Ja". Kortini vísir kanningin, at hóast fosturtøka ikki er eitt óvanligt fyribrigdi í Føroyum, so eru lutfalsliga nógvir føroyingar – meira enn ein triðingur – sum ikki siga seg vita um nakran, ið hevur fingið framt fosturtøku. Hetta kann benda á, at vitan um fosturtøku ikki verður umrødd breitt millum familju, vinir og kenningar. Tó ber ikki til at siga nakað við vissu við støði í hesum tølum, men hjá flestum kvinnum og familjum er ein fosturtøka ivaleyst eitt sárt evni at tosa um.






Verður hugt at kynsbýtinum er ein eyðsýndur munur millum vitanina hjá kvinnum og monnum.

Munandi fleiri kvinnur enn menn siga seg hava hoyrt um føsturtøku, og munandi fleiri menn enn kvinnur siga seg ikki hava hoyrt um nakran, ið hevur fingið framt fosturtøku. Ein orsøk til hetta kann eittnú hugsast at vera, at kvinnur møguliga tosa meira við aðrar kvinnur um fosturtøku, enn menn tosa við aðrar menn um sama evnið. Harumframt kann hugsast, at pápin at barninum í summum førum ikki er greiður yvir, at kvinnan er við barn, og at vitanin um framdar fosturtøkur millum menn tí er samsvarandi lægri.




Hyggja vit at aldursbýtinum er toliliga javnt býtt millum aldursbólkarnar, tó at tey elstu og serliga tey yngstu víkja frá.

Munurin millum vitan um fosturtøku er rættiliga eyðsýndur millum tveir teir yngstu aldursbólkarnar. Ilt er at siga, hvør orsøkin er til hetta. Nýggjastu tølini frá Danmarks Statistik (2014) vísa, at umleið tvífalt so nógvar fosturtøkur verða framdar í aldursbólkinum 15-29 ár í mun til aldursbólkin 30-39 ár. Søguliga er tað sama talið í Føroyum umleið 1,5 (1994-2014) og tí kann munurin millum vitanina hjá aldursbólkunum tykjast sjáldsama stórur.

Verður hugt at útbúgvingarstøði sæst ein greiður samanhangur. Tess hægri útbúgving, tess meira vitan um hendan spurningin.




Hesin samanhangur hongur í ávísan mun natúrliga saman við úrslitinum viðvíkjandi aldursbýtinum. Tó er tað ikki heilt upplagt at munurin skal halda áfram at vaksa. Til tess at kunna siga nakað ítøkilig um hetta verður tó neyðugt at hyggja at aldursbýtinum í einstøku bólkunum. Hetta dátugrundarlagi er ikki tøkt, og tað er harumframt óvist, um tað hevði verið nóg sterkt at gjørt niðurstøður útfrá.

# Verður lóggávan fylgd?

Tølini vísa, at bert umleið ein av fimm føroyingum hava ta fatan, at lóggávan um fosturtøku verður fylgd. Undan kanningini vórðu luttakararnir sum nevnt kunnaðir í stuttum um lóggávuna á økinum. Tað er tí merkisvert, at so fáir føroyingar hava fatan av, at lóggávan verður fylgd. Umleið ein triðingur av luttakarunum hevur harafturat vitan um, at fosturtøkur eru framdar av øðrum orsøkum.

Nógv bendir tí á, at fosturtøkur verða framdar í Føroyum, sum ikki hava heimild í lógini. Her má tó samstundis havast í huga, at tað ikki er vist, at kvinnan sigur tað sama við læknan og eitt nú kenningar um orsøkina til ynskið um fosturtøku. Kanningin sigur sostatt onki um, hvørt læknar halda seg til lógina ella ikki.



Verður hugt at kynsbýtinum sæst eisini í hesum spurninginum ein greiður munur á monnum og kvinnum.

Fleiri enn tvær av fimm kvinnum siga seg sostatt vita um fosturtøkur, ið eru framdar av orsøkum, sum ikki eru fevndar av lógini. Og aldursbýtið vísir, at tað eru serliga yngru ættarliðini, sum hava eina slíka vitan.






Verður hugt eftir útbúgvingarstøðinum sæst eisini her ein ávísur munur á lægru og hægru útbúgvingunum.




Tað eru sostatt serliga fólk við fólkaskúla sum hægstu útbúgving, ið hava fatan av, at lógin verður fylgd, meðan tað serliga eru fólk við langari víðari útbúgving, ið siga seg hava vitan um fosturtøkur, sum eru framdar av øðrum orsøkum.




Ein líknandi munur sæst á bólkunum við og uttan børn undir 18 ár, har væl færri við børnum hava fatan av, at lóggávan verður fylgd.

Verður hugt at politiskum liti er býtið hetta.




Her sæst, at tey, sum hava greiðastu hugsanina um spurningin eru tey, ið høvdu valt blankt um val var í dag. Bert ein góður triðingur av teimum er í iva. Gott og væl helmingurin av teimum siga seg vita um fosturtøkur, sum eru framdar av øðrum orsøkum, meðan bert umleið ein av 10 hava fatan av, at lógin verður fylgd. Eitt vet fleiri javnaðar- og miðfloksveljarir – umleið ein av átta – hava somu fatan. Størsta álitið á at lóggávan verður fylgd hava sambandsveljarar við 28,4 prosentum.

# Dagføring av lóggávuni

Kanningin vísir, at ein greiður meiriluti av teimum, ið taka støðu til spurningin – og nærum helmingurin av øllum luttakarunum – halda, at fosturtøkulóggávan eigur at verða dagførd í sambandi við yvirtøkuna av málsøkinum. Ein av fimm heldur ikki, at lóggávan skal dagførast, meðan ein triðingur av teimum spurdu ikki tekur støðu til spurningin. Samanumtikið meta væl fleiri føroyingar í dag, at lógin eigur at verða broytt, um samanborið verður við Gallup-kanningina frá 2002. Tá vildu 35 prosent av teimum spurdu varðveita verandi lóggávu. 17 prosent søgdu seg ikki vita, meðan restin vildu so ella so broyta lóggávuna.









Um hugt verður at aldursbýtinum eru teir yngstu aldursbólkarnir mest fyri at broyta lóggávuna, meðan teir eldru í størri mun vilja varðveita verandi lóggávu. Tann elsti aldursbólkurin ivast mest í spurninginum, og av teimum, sum taka støðu eru umleið helmingurin fyri og helmingurin ímóti.

Landafrøðiliga býtið vísir, at fólk úr Norðoyggjum ivast mest í hesum spurninginum. Fólk úr Eysturoynni eru størstu fortalararnir fyri at varðveita lóggávuna, men fólk úr Suðurstreymoy tykjast mest broytingarsinnað. Um bert verður hugt at teimum, ið taka støðu til spurningin, so eru eysturoyingar fegnast um verandi lóggávu, meðan heili fimm av seks úr Vágunum ynskja broytingar.

Eisini í hesum spurninginum eru rættiliga eyðsýndir munir at hóma, um hugt verður at hægstu útbúgvingini hjá luttakarunum.




Tey, ið hava fólkaskúla sum hægstu útbúgving, ivast mest í spurninginum, meðan lutfallið annars líkist samlaða úrslitinum. Handverkaraútbúgvin eru sterkastu fortalarar fyri verandi lóggávu, men samstundis er ein munandi partur av hesum bólkinum fyri at gera broytingar. Fólk við einari langari víðari útbúgving ivast minst í spurninginum, og tað er eisini í hesum bólkinum, at væl flest ynskja broytingar. Samanumtikið veksur stuðulin til nýggja lóggávu saman við útbúgvingarstøðinum, samstundis sum ivin er lækkandi. Ein samsvarandi samanhangur sæst ikki millum tey, ið vilja varðveita verandi lóggávu – stuðulin til hetta sjónarmið tykist sostatt rættiliga støðugur.

Millum politisku flokkarnar á tingi hevur einans Miðflokkurin tikið støðu til nýggja lóggávu. Í august 2017 segði flokkurin við føroyskar miðlar, at fosturtøka eigur at vera bannað, uttan tá ið vandi er fyri lívi og heilsu hjá kvinnuni ella barninum. Nærum helmingurin av veljarunum hjá flokkinum ynskja tó at varðveita verandi lóggávu og minni enn ein triðingur ynskir broytingar.




Kanningin vísir, at meiriluti er í øllum flokkum – uttan Miðflokkinum – fyri at broyta verandi lóggávu. Greiðasti meiriluti er – fyriuttan bólkin, ið hevði atkvøtt blankt – millum veljarar hjá Javnaðarflokkinum, Framsókn og Tjóðveldi. Nærum tveir triðingar av veljarunum hjá sitandi samgongu ynskja sostatt eina nýggja lóggávu. Bert 5,7 prosent av veljarunum hjá Javnaðarflokkinum ynskja at varðveita verandi lóggávu, meðan 29,1 prosent av veljarunum hjá Sambandflokkinum ynskja tað sama.

## Hvussu skal lóggávan vera?




Kanningin vísir, at greiður meiriluti er fyri at fosturtøka so ella so skal loyvast. Heili 17 av hvørjum 20 føroyingum stuðla hesum sjónarmiði. Kanningin vísir eisini, at stuðulin til at banna fosturtøku er fallandi. Í 2002 vildu 14 prosent banna fosturtøku – hetta talið er farið í helvt seinastu 15 árini. Samstundis tykist stuðulin til fría fosturtøku munandi styrktur – úr níggju prosentum í 2002 og upp í heili 29 prosent. Nærum tvífalt so nógvir føroyingar halda tó, at fosturtøka bert skal loyvast í ávísum/serligum førum. Stuðulin til hetta sjónarmiðið hevur verið at kalla støðugur seinastu árini, um samanborið verður við 2002-kanningina.




## Visti tú at...?

Danska lóggávuvaldið hevur heimild at broyta ta føroysku fosturtøkulóggávuna, men danskir politikarar hava fleiri ferðir sagt seg ikki vilja broyta lógina, uttan so at ynski kemur úr Føroyum um tað. Hetta er í

Aldursbýtið vísir, at hugsanin um, hvussu lóggávan á hesum økinum eigur at vera, ikki er stórvegis knýtt at aldri.

## Visti tú at...?

Í Danmark og Norra er frí fosturtøka til og við 12. viku. Í Svøríki er frí fosturtøka heilt til 18. viku. Í Íslandi og Finnlandi er ikki frí fosturtøka, men lóggávurnar eru væl linari samanborið við ta føroysku.




Heldur ikki kynið tykist hava stórvegis ávirkan á úrslitið. Eitt vet fleiri menn en kvinnur ynskja tó fría fosturtøku og samsvarandi færri vilja bert loyva fosturtøku í ávísum/ serligum førum.

Um hugt verður at tí landafrøðiliga býtinum, so tykjast føroyingar sum heild hava somu hugsan kring landið, tó at ein ávísur munur er at hóma í mun til fría fosturtøku og fosturtøkubann.




Væl færri fólk úr Norðoyggjum og Eysturoynni stuðla fríari fosturtøku, um samanborið verður við restina av landinum. Stuðulin til at seta í verk bann fyri fosturtøku tykist hinvegin størstur í Vágunum, Norðstreymoy og Eysturoynni.

Verður hugt at, hvønn flokk luttakararnir velja, so eru eisini fleiri áhugaverd úrslit at hóma.




Meiriluti er sostatt millum veljararnar hjá øllum flokkum fyri at loyva fosturtøku. Greiðastu støðuna hava veljarar hjá Framsókn, har allir luttakandi veljarar eru fyri at loyva fosturtøku. Hjá hinum flokkunum er stuðulin úr umleið 85 prosentum og uppeftir, tó at Miðflokkurin víkir frá við knøppum 55 prosentum.

Í tveimum flokkum – Framsókn og Tjóðveldi – er meiriluti fyri fríari fosturtøku. Størsti meirilutin eri í Framsókn, har tríggir av fimm veljarum hjá flokkinum hava hetta sjónarmiðið.

Nakað lægri er Tjóðveldi og blanku atkvøðurnar, og síðani Javnaðarflokkurin og Sambandsflokkurin.

Ongin veljari hjá Miðflokkinum gav til kennar ynski um at seta í verk fría fosturtøku. Tað er eisini í Miðflokkinum at flestu veljararnir – ein triðingur – ynskja at banna fosturtøku. Millum veljararnar hjá hinum flokkunum tykist at vera lutfalsliga lítil undirtøka fyri at banna fosturtøku.

# Nær fosturtøka skal loyvast




Hesin seinast spurningurin í kanningini varð ikki settur øllum luttakarunum, men einans teimum 56 prosentunum, ið góvu til kennar, at tey bert ynsktu at loyva fosturtøku í ávísum/serligum førum. Tey 29 prosentini, sum ynskja fría fosturtøku, eru sostatt ikki við í hesum partinum av kanningini. Hesi kunnu hugsast at sagt ja til allar valmøguleikar. Um øll høvdu verið spurd hendan spurning, so høvdu úrslitini tí verið væl hægri.

Onki mark var fyri, hvussu nógvar svarmøguleikar luttakararnir kundu velja. Viðmerkjast skal eisini, at fulla heitið á svarmøguleika sjey var "*Sosial atlit tala fyri at loyva fosturtøku (t.d. aldur, inntøka, arbeiðsstøða, familjuviðurskifti og tílíkt)*".

Teir flestu luttakararnir góvu til kennar, at fosturtøka skal loyvast um vandi er fyri lívi ella heilsu hjá kvinnuni. Nakað færri halda, at neyðtøka og blóðskemd eiga at vera orsøkir til, at fosturtøka verður loyvd. Gott og væl helmingurin heldur, at vandi fyri lívi ella heilsu hjá barninum eigur at vera orsøk til at loyva fosturtøku, meðan bert ein triðingur vil leggja dent sálarligu heilsuna hjá kvinnuni. Færri enn ein av fimm meta, at ein fosturtøka skal kunna grundast á sosial atlit ella sannlíkindi fyri, at barnið ber brek.

Aldursbýtið vísir ávísar munir millum aldursbólkarnar.




Serliga yngstu aldursbólkarnir leggja dent á vandan fyri lívi ella heilsu hjá barninum, og tað sama er galdandi fyri sálarligu heilsuna hjá kvinnuni. Eldri aldursbólkarnir leggja minni dent á neyðtøku sum orsøk, meðan toliliga javnt býtt er í mun til blóðskemd.

Ymisk er eisini, hvussu stórur dentur verður lagdur á ymisku svarmøguleikarnar kring landið.




Til dømis halda luttakarar úr Suðuroy og Suðurstreymoy í størri mun enn fólk úr eitt nú Norðurstreymoy, at sannlíkindini fyri, at barnið ber brek, hevur týdning fyri um fosturtøka skal loyvast. Á sama hátt verður stórur dentur í Vágunum lagdur á blóðskemd sum orsøk í mun til í stórum pørtum av restini av landinum. Eisini hava sosialu atlitini størst týdning fyri fólk úr Vágunum og Suðurstreymoy.

At enda er nakað av muni at hóma, um hugt verður at politiska litinum hjá luttakarunum.




Serliga veljarar hjá Sjálvstýrisflokkinum og Fólkaflokkinum leggja til dømis dent á vanda fyri lívi og heilsu hjá kvinnuni. Á sama hátt skara veljarar hjá Framsókn og Javnaðarflokkinum framúr í mun til vanda fyri barnið. Sálarligar avbjóðingar hjá kvinnuni hevur størri týdning fyri veljarar hjá Framsókn og Tjóðveldi. Eisini sæst, at ongin veljari hjá Miðflokkinum vilja leggja dent á sannlíkindi fyri, at barnið ber brek.

# Kjakið um fosturtøku í Føroyum

Eins og hugburðskanningin vísir, so eru fólk ymisk á máli um fosturtøkuspurningin. Og verður hugt at kjakinum um fosturtøku í almenna rúminum í Føroyum, so vísir okkara greining, at kjakið hevur fyrst og fremst havt tvey eyðkenni:
Antin hevur tað verið óvanliga bonskt og ógvusligt.

Ella er tað púra kvirt.

Jenis av Rana, formaður Miðfloksins, segði í viðmerking við in.fo (9. august 2017) at "vápnahvíld" er í kjakinum um fosturtøku í Føroyum. Tí var hann glaður fyri, at bæði Ung fyri Miðflokkin og Sosialistisk Ung á hvør sín hátt høvdu hálað kjakið fram aftur. Hugburðurin til spurningin er tó diametralt ymiskur hjá hesum báðu ungmannafeløgunum. Tað fyrra er ímóti fosturtøku, meðan tað seinna vil hava fría fosturtøku í Føroyum. Mótsetningurin er ideologiskur og avmyndar uppá nógvar mátar tann politiska vígvøll, har meiningarnar um fosturtøku verða syftar í Føroyum.

Hendan gjøgnumgongdin av kjakinum um fosturtøku í Føroyum er uppá ongan máta fullfíggjað. Men hon er heldur ikki politisk. Vit vildu lýsa kjakið, soleiðis sum tað er og hevur verið, við at vísa á tey sjónarmið, sum hava verið afturgangandi í miðlunum. Gjøgnumgongdin hevur heldur ikki sum mál at kasta ljós á nakra broyting í kjakinum sum so.

Kjakið snýr seg í høvuðsheitum um nøkur afturvendandi sjónarmið, sum ofta eru torfør at sameina:

- rættin til rættartrygd hjá barninum í móðurlívi
- rættin hjá kvinnuni at ráa yvir egnum kroppi
- fosturtøka sum dráp
- rásarúmið innan lóggávuna

Á sama hátt eru aktørarnir ofta afturvendandi við viðmerkingum í miðlunum. Miðflokkurin hevur t.d. verið sera sjónligur í hesum málinum, men tað sama hava eisini kvinnur sum Turið Debes Hentze og aðrar við henni. Fleiri høvundar at lesarabrøvum velja at vera dulnevndir, sum kanska sigur eitt sindur um, hvussu viðbrekin spurningurin er.

Við hjálp frá fyrst og fremst talgildað arkivinum www.tidarrit.fo, hava vit leitað fram tíðarskeið, tá kjakið um fosturtøku aftur vaknar. Vit hava í høvuðsheitum nýtt Dimmalætting, Oyggjatíðindi og Sosialin saman við nøkrum brotum úr Løgtingstíðindi fyri at seta tilfarið saman. Kelduávísingar eru undir hvørjum sitatið, soleiðis at ein og hvør kann finna ella eftirkanna tilfarið. Sjálvandi hava vit ikki funnið fram alt, sum skrivað er um fosturtøku, og vit hava heldur ikki havt møguleika at taka alt við í faldaran. Øll, ið leita, fara tí helst at finna ymiskt, sum ikki stendur her. Onnur fara kanska at vera ósamd í summum tulkingum.

Men hetta er kanska ein byrjan uppá eina roynd at lýsa eitt kjak, sum ofta hevur koyrt Føroyar í tvíningar.

"Eg kann bara siga, at tað var heppið, at vit ikki høvdu fría fosturtøku, tá ið hesi ungfólkini vórðu gitin í móðurlívi."

*Hetta sigur Jenis av Rana, formaður í Miðflokkinum, í viðmerking til at ungmannafelagið hjá Javnaðarflokkinum (SU) vil, at frí fosturtøka skal vera í Føroyum. Fyri Miðflokkin er neyðtøka ei heldur nakað, sum rættvísgerð fosturtøku. (www.in.fo – 9. august 2017)*

**Mennirnir kjakaðust um fosturtøku**

*"Morð", í stríð við "Guðs lóg" ella "neyðugt undantak"?*

Á pallborðsfundi í Sørvági í 1983 luttóku umboð fyri politisku flokkarnar og ein sálarlækni til kjak um fosturtøku. Merkisvert var at eingin kvinna var millum luttakararnar.

Á pallborðsfundinum bar Jóhannes Martin Olsen fyri Sambandsflokkin fram, at Bíblian áleggur okkum at varðveita lív, og at *"eingin heimild á jørðini kann broyta Guðs lóg."* Fyri Framburðs- og Fiskivinnuflokkin helt Adolf Hansen fyri, at fosturtøka var at rokna sum *"beinleiðis morð",* og at vit sum kristin mugu virða tað, sum er í móðurlívininum. Jákup Lindenskov úr Javnaðarflokkinum helt hinvegin, at fosturtøka er *"eitt neyðugt undantak"*, og at tað er órealistiskt at seta forboð í verk: *"Tað kann ikki vera rætt, at vit blundandi lata ganga um okkum, vitandi at fleiri leita burtur fyri at fáa fosturtøku framda."*

"Skulu vit lata nakrar fáar *menn* avgera, hvør ið skal liva og hvør ikki skal?"
*Fríðtór Debes spyr, hvør verjir lívið í Dimmalætting 28. mars 1985*

## Kvinnurnar svaraðu

Kvinnufylkingin í Keypmannahavn var skjót við aftursvari í Sosialinum, har tær m.a. fýltist á, at bara menn skuldu sita og avgera viðurskifti, sum hava við kvinnuna at gera.

*"Ikki kvinnurnar, sum skulu kenna á sínum kroppi bæði fosturtøkuna, sum teimum verður loyvd og hina, sum teimum verður sýtt, verða spurdar."*

*"Pallborðsluttakararnir føla tað sum eina samfelagsuppgávu at verja tað gitna eggið í móðurlívi. Men **hví** føla teir ikki somu ábyrgd yvir fyri teimum børnum, sum komin **eru** í verðina og gera lívið hjá børnum og foreldrum liviligari?"*

Kvinnufylkingin í Keypmannahavn, í Sosialinum 17. mai 1983

"Tað er so nógv annað sum er verri fyri sálarligu støðuna hjá fólki, enn at fáa fosturtøku, eitt nú at dríva hor – eftir kristnum sjónarmiðum. Tað er tó hetta kvinnur ynskja, sum fáa fosturtøku."

Fundareferat frá pallborðsfundi um fosturtøku – orðini skal Árni Olsen, sálarlækni hava sagt. Sosialurin 12. april 1983

Eisini ein sum nevnir seg "Sysifos" hevði rættiliga markantar viðmerkingar til fundarreferatið:

*"Tað sýnist sum um "frí fosturtøka" í Føroyum merkir, at ein og hvør kvinna fer út á marknaðin at "dríva hor", og so bara sum einki fer og fær sær eina fosturtøku av og á, eins og ein rutina. Henda léttisoppafatan av einum so álvarsligum máli kemst helst av, at tað so gott sum bert eru mannfólk, og helst slík mannfólk, sum aldri eru komin í námind av vandamálinum, sum verða tikin sum framsøgumenn um evnið, um tað skal viðgerast.(...) Men at støðan skal vera sum hon er nú, at tað er ein spurningur um fíggjarliga støðu, um tú kanst fáa fosturtøku ella ikki, tað er bæði moralskt og mannarættindarliga óverdugt fyri eina mentaða tjóð."*

"Sysifos" í Sosialinum, 19. apríl 1983 – "Ert tú hora um tú fært abort?"

Miðflokkurin hevur fleiri ferðir víst, at tey vilja banna fosturtøku uttan so, at lív mammunnar er í vanda.

Í samrøðu við Sosialin 30. August í 1994, vísir **Tordur Niclasen** á, at "tann lættasta loysnin" ikki skal vera møgulig fyri kvinnuna:

> "Um Miðflokkurin ráddi, so skuldi fosturtøka verið bannað, undantikið í heilt fáum førum, har tað stendur um lív. Tann *lættasta* loysnin hjá kvinnuni skal ikki hereftir verða galdandi. Kvinnan skal hereftir fáa so góða serkøna ráðgeving sum gjørligt, t.v.s. at vit fara at styrkja serlæknaliga kunnleikan."
>
> Tordur Niclasen, í samrøðu við Sosialin 30. august 1994

Í aftursvari til Tord Niclasen skrivar "S.T." soleiðis:

> *"Síðani skrivar hann: "Tann lættasta loysnin hjá kvinnuni skal ikki longur verða galdandi." Tordur góði, her er als ikki talan um nakra lætta loysn hjá kvinnuni, men enn einaferð er tað kallkynið, ið sleppur snikkaleyst. Hvat veit Tordur Niclasen um alt tað ið kvinnan skal ígjøgnum psykiskt. (...)*
> *At nøkur religiøsforvirrað gammeldags kallkyn skulu bestemma um kvinnan velur at fáa fosturtøku, haldi eg er heilt burturvið. (...)*
> *Kallkynið sleppur so óluksáliga nemt undan omanfyristandandi problemið, at tað er til at spýggja."*
>
> "S.T.", Sosialurin 6. september 1996

Sum vit síggja snýr ósemjan seg ikki bara um sjálva fosturtøkuna, men eisini um í hvønn mun mannfólk skulu sleppa at avgera um viðurskifti, sum hava við kvinnukroppin og lív hennara at gera. Fleiri vísa eisini á, at fosturtøka *er* ein veruleiki – óansæð hvussu nógv ein herðir lóggávuna.

**“Fosturtøka er ein veruleiki – virðið rættin hjá kvinnuni!”**

Ein, sum ofta hevur gjørt vart við seg í kjakinum um fosturtøku er Turið Debes Hentze, sum m.a. var forkvinna í Javnstøðunevndini árini 1994-2002. Hon vísir í fleiri førum á, at tað er ein ynskidreymur at ímynda sær eitt samfelag uttan fosturtøkur, og at tað einasta, sum ein herd lóggáva ber við sær er, at kvinnur fara at leita sær til Danmarkar at fáa fosturtøku.

“Samfelagið verður helst ongantíð so, at eitt gitið egg í búkinum, og sum seinni verður til eitt barn, altíð er vælkomið. Tvørturímóti kemur tað ofta fyri, og hjá summum so tvørt fyri, at best er at beina fyri tí – ongantíð ov skjótt.”

Turið Debes Hentze í lesarabrævið, Dimmalætting 2. mars 1999

Í 80’unum og 90’unum varð eisini ofta víst á, at tað er ódámligt og órímiligt, at næstan bara mannfólk skulu sleppa at lóggeva og diktera um kroppin og lívsviðurskifti hjá kvinnuni. Beate L. Jensen skrivar soleiðis í 1994:

*“At tað nú skal eydnast einum lítlum bólki av fundamentalistiskum mannfólkum við Khomeyni-hættum at bumba føroysku kvinnuna aftur í svartastu miðøld, verður nærum ikki til at bera.”*

Beate L. Jensen í Dimmalætting 27. august 1994

Í 1994 minnir Turið Debes Hentze eisini á, at tað er kvinnan og *ikki* maðurin, sum leggur kropp og sál til, og at banna fosturtøku bert hevði havt við sær, at fosturtøka verður framd:

*“... undir ótryggum og lívshóttandi umstøðum, umframt at hon verður revsað fyri sína gerð, sum hon neyvan hevur valt at gera til stuttleika. Abort undir slíkum umstøðum er veruleikin í einum og hvørjum samfelag, sum kriminaliserar og bannar abort.”*

Turið Debes Hentze, Dimmalætting 13. september 1994

Súsanna Dam skrivar eisini í lesarabrævi, at vit ofta gloyma at tosa um, hvønn leiklut pápin hevur í mun til fosturtøku. Sambært henni er fosturtøka ein neyðloysn sum ofta stendst av, at pápar ikki kenna sína ábyrgd:

*“Í veruleikanum er tað helst so, at um allir pápar kendu sína ábyrgd, vóru nokk fáar kvinnur, sum yvirhøvur umhugsaðu at fáa framt fosturtøku. (...) Ein fosturtøka er ikki so nógv ein óhugnalig loysn uppá úrslitið av siðloysi kvinnunnar, sum tað er eitt óhugnaligt tekin um, at pápar og í ávísan mun samfelagið svíkur sínar skyldur.”*

Súsanna Dam, Dimmalætting 8. oktober 1994

*"Ongin, og tá slett ikki nakar maður, eigur at nokta kvinnum fría fosturtøku. (...) Hava tit býttlingar ongantíð tonkt uppá, at kvinnan eisini kann taka skaða sálarliga, um hon blívur noydd til at føða eitt óynskt barn? (...) Um tað vóru mennirnir, sum skuldu verið uppá vegin í 9 mánaðir, so hevði tað verið ílagi við fríari fosturtøku. (...) Frí fosturtøka er ein partur av kvinnufrígerðingini."*

Ein sum rópar seg "Diana" skrivar eisini 27. mai 1986 í Dimmalætting at fosturtøka er nakað, sum umræður kvinnur, og at menn tí ikki skulu sleppa at løggeva ímóti fosturtøku

Tað eru nógv fleiri dømi enn hesi. Eitt eyðkenni er, at næstan bara kvinnur viðmerkja til frama fyri fríari fosturtøku. Hesin parturin av kjakinum snýr seg í stóran mun um at virða rættin hjá kvinnuni at ráða yvir egnum kroppi og at ikki blunda fyri, at fosturtøka altíð fer at vera ein veruleiki, óansæð um lóggivið verður ímóti tí. Somuleiðis eru fleiri dømi um, at kvinnurnar halda mennirnar vera dupultmoralskar og vita lítið um viðurskiftini hjá kvinnum, sum bera eitt óynskt barn.

Mótmæli eru tó nógvastaðni – eisini frá kvinnum – sum halda, at tað ikki ber til at redusera fosturtøkuspurningin til ein spurning um rættin hjá kvinnum at ráða yvir egnum kroppi. Ein, sum skrivar aftursvar til Turið Debes Hentze, er Anne-Lene Midjord Olofson. Hon leggur dent á, at fosturtøka er ein spurningur um lívshugburð og í síðsta enda ein etiskur og filosofiskur spurningur. Sjónarmiðið er, at tað ber ikki til at staðfesta, nær eitt fostur verður til eitt barn og síðani ein persón í móðurlívi, og at spurningurin tí er etiskt-filosofiskur.

*"Påstanden om, at et ufødt barn ikke er en person, og at det derfor ikke kan have menneskeværd, forudsætter, at der eksisterer en grænse, som hvert enkelt menneske på et eller andet tidspunkt i sin biologiske udvikling overskrider, hvorved det bliver til en person. Biologerne kender imidlertid ikke noget til en sådan grænse."*

Anne-Lene Midjord Olofson, Dimmalætting 6. oktober 1994

## “Fosturtøka er einki øðrvísi enn nazistarnir”

Eitt, sum gongur aftur í ymsum politiskum viðmerkingum og lesarabrøvum, er samanberingin millum fosturtøku og nazismu. Tað eru fleiri, ið føra fram, at tann sortering, sum fosturtøkur innibera, kann samanberast við ta sortering, sum fór fram undir nazismuni, tá m.a. jødar og fólk við breki vórðu skild frá restini og týnd til deyðis. Somuleiðis varð í 80’unum og 90’unum dúgliga ávarað ímóti teirri “degradering” av mannalívinum, sum mong hildu fosturtøku innibera. Løgtingsmaðurin Tordur Niclasen siteraði í fleiri førum orðini hjá Móður Teresu við handanina av friðarheiðursløn Nobels í 1979: “Fosturtøka er hernaður móti børnum, og er skríggið frá tí ófødda størsta hóttan móti friðinum í dag.”

> “Vit tosa ofta um nazismuna. Men fosturtøka er onki øðrvísi enn nazistarnir. Hetta er ein lóg, sum tryggjar tað livandi barnið, men vit hava onga lóg, sum tryggjar tað ófødda barnið. Men forboð loysir ikki trupulleikan.”
>
> Jenis av Rana, í Løgtinginum 20. mars 2012. Viðmerkingin kom í sambandi við, at Løgtingið viðgjørdi eitt uppskot um trygging ímóti arbeiðsskaða.

*“Ásannast má, at eitt minkandi virði (**degradering**) av menniskjanum er farin fram tey seinastu árini. Hetta er m.a. komið til sjóndar í at eitt land fyri og annað eftir hevur sett lóg um “fría” fosturtøku í verk.”*

Tordur Niclasen í fyrispurningi til landsstýrismann (Løgtingstíðindi 01 januar 1985, 438-441)

*“ Men tað vísir seg, at lívið er **degraderað** í allar hægsta grad av okkara politikarum og stýrandi í landinum(...) Komið er tað so langt, at vit eru farin at avgera, hvør ið hevur rætt til at liva og hvør ið ikki hevur tann forrætt her í lívinum. Vit eru fallin í ta somu grøv, sum Hitlers-menn fullu í fyri góðum 40 árum síðani. Teir sorteraðu! Vit sortera!”*

Fríðtór Debes, Dimmalætting 28. mars 1985

Tað eru eisini fleiri, sum seta spurningin upp soleiðis: Um vit loyva fosturtøku, hvat verður so tað næsta? Hesi vísa á, at vit í sorteringini av fostrum eisini leggja upp til, at mann kann sortera onnur, óynskt lív burtur. Hetta líkist tí, sum vit ofta rópa "glíðibreyt". Sum tá Niels Pauli Danielsen og Hans A. Joensen spyrja, hvussu okkara umsorgan fyri t.d. gomlum og teimum, sum bera brek verður:

*"Vanvirðingin av tí ófødda lívinum fær soleiðis eisini avleiðingar fyri tað fødda lívið, og vit nærkast tí sjónarmiði, sum fekk Nazi-Týskland at beina fyri øllum teimum, ið veik vóru og nevndust ónyttur. Hvar enda vit tá? Hvussu verður við umsorgan okkara fyri teim brekaðu?"*

Niels Pauli Danielsen, í Løgtinginum 23. mars 1994

*"Tá so siðloysi og fosturtýning er vorðið vanligt, og nøkur ár eru gingin, byrjar pípan at fáa annað ljóð, tá byrja tey at tosa um, at avlíva tey gomlu sum eru kedd av at liva. Tá so aftur ein tíð er fráliðin, skulu vit rokna við, at hesi somu vilja tala fyri at hjálpa teimum evnaveiku og kryplu burtur."*

Hans A. Joensen, Oyggjatíðindi 23. oktober 1981

**“Barnið í móðurlívi eigur somu rættartrygd sum aðrir borgarar”**

Dømini omanfyri forklára eisini, hví fleiri gjøgnum árini hava sett fram krøv til rættartrygd fyri fostur í móðurlívi. Hesi meta, at barnið er ein sjálvstøðugur skapningur frá giting, og tí eigur rættin til lív, og at hesin rættur ikki kann verða sýttur við fosturtøku – heldur ikki í førum har mamman er vorðin við barn orsakað av neyðtøku. Fosturtøka skal tí bert vera loyvd, tá tað stendur um lív kvinnunnar. Løgtingsfólk umboðandi ávikavíst Kristiliga Fólkaflokkin og Miðflokkin hava tískil fleiri ferðir sett fram broytingaruppskot til tess at veita barninum í móðurlívi somu rættartrygd sum øllum øðrum í samfelagnum.

Í viðmerking til uppskot frá Miðflokkinum í 1995 skrivar Lasse Klein (Kristiligi Fólkaflokkurin) soleiðis:

> *“Rættartrygdin hevur samband við, at tað á sama hátt sum eitt barn hevur arvarætt frá gitingini og tí frá giting eigur lut í allari teirri rættartrygd, sum veitt verður einum og hvørjum borgara í hesum landi, og tí er tað ikki meira enn rímiligt, at rættartrygdin eisini fevnir um t.d. spurningin um fosturtøku.”*
>
> Lasse Klein, Løgtingstíðindi 3. januar 1997

Í viðgerðini av sama uppskoti vóru m.a. Føroya Pro Vita og Rodmundur í Liða, yvirlækni, samd í, at lógin var ov frí, og at lógin eigur at innihalda nøkur prinsipp um at varðveita lív. Tó vísti Rodmundur í Liða á, at hann ikki ynskti eitt fulkomið forboð, tí tað einans hevði úrslitað í, at fosturtøkur vórðu framdar *“ólógliga m.a. av fólki, ið ikki hevði neyðugu útbúgvingina”* (Sosialurin 3. februar 1996).

Árið eftir, í 1997, skrivaði Føroya Pro Vita um hugtakið *Survivors Guilt* í samband við fosturtøku í grein í Oyggjatíðindi:

> *“Børn, sum vaksa upp í familjum, har fosturtýning er framd, liva við eini vitan um at foreldrini hava týnt eina systur ella ein beiggja. Hesi børn seta spurnartekin við egnu tilveru sína: “hví livi eg, tá ið eitt av systkjum mínum, sum var eins gott og eg, bleiv týnt?” “*
>
> *Føroya Pro Vita um fosturtøku, Oyggjatíðindi 24. oktober 1997*

Kjakið um hvørt barnið eigur rætt til somu rættartrygd sum aðrir borgarar er í stóran mun eitt etiskt, biologiskt og filosofiskt kjak, sum helst ongantíð fer at finna á mál. Tey seinastu góðu 30 árini eru bløðini stundum umgjørd til ein ideologiskan vígvøll, har ymsu sjónarmiðini bresta saman. Tað eru tey, hvørs høvuðsniðurstøða er, at barnið í móðurlívi eigur íbornan rætt til lívið – mótvegis teimum, sum fyrst og fremst halda, at kvinnan má sleppa á ráa yvir sínum egna kroppi, óansæð um fostrið verður uppfatað sum *partur* av kvinnuni í móðurlívi, ella sum *sjálvstøðugur skapningur* frá giting. Um fosturtøka verður framd er greitt, at til ber ikka at rúma báðum sjónarmiðum samstundis.

**"Læknarnir halda seg ikki til lógina"**

Í 2003 boðaði landsstýrismaðurin í heilsumálum Bill Justinussen frá, at hann hevði sent kommunulæknunum runt landið eitt skriv, har hann heitti á teir at halda seg til lógina um fosturtøku. Orsøkin var tann, at hann metti, at talið av fosturtøkum í Føroyum var alt ov høgt, og at hann hevði fingið frænir av, at tað var munandi lættari at fáa góðkent fosturtøku hjá summum læknum enn øðrum. Metingin var tískil, at lógin var ov ógreið, leys og tilvildin avgjørdi, um ein kvinna fekk fosturtøku ella ikki. Hetta elvdi til nógv kjak í løgtinginum og miðlunum, kanska serliga tí at onkur lækni tók undir við uppáhaldinum hjá landsstýrismanninum. Ein teirra var Kári Jacobsen, kommunulækni í Havn:

*" Tú mást gjarna siterað meg fyri at siga, at kommunulæknar í Føroyum fremja ólógligar fosturtøkur"*

Kári Jacobsen,
kommunulækni

*"Tú mást gjarna siterað meg fyri at siga, at kommunulæknar í Føroyum ikki halda seg til lógina um fosturtøku. (...) Eingin skal fortelja mær, at tað ræður um lív hjá 48 mammum í sambandi við barnsburð her á landi á hvørjum árið."*

Kári Jacobsen í samrøðu við Dimmalætting, 8. oktober 2003.

Hetta er eitt gamalt sjónarmið í kjakinum um fosturtøku í Føroyum, og serliga umboð fyri Miðflokkin og Kristiliga Fólkaflokkin hava fleiri ferðir víst á, at lógin annaðhvørt ikki verður hildin, ella at hon er ov lin. Hartil hava mótstøðufólk móti fosturtøku ofta hildið uppá, at flestu fosturtøkur í Føroyum verða grundaðar á sokallaðar "medisinskar og sosialar orsøkir." Hvørt hesi hagtøl ella hendan vitan er álítandi er tó sera ivasamt. Orsøkirnar til  at kvinnur fáa framt fosturtøku eru bert nevndar í journalum, og tað sleppur mann ikki at skráseta – tí eru slík hagtøl ógjørlig at fáa fatur á.

Aðrir kommunulæknar hava tó, uttan at avvísa uppáhaldið um at lógin kann tulkast, víst á, at tað er júst hetta, sum ger, at ein røtt avgerð kann takast um fosturtøku. Karl Johan Fosså skrivar í 1999 sum viðmerking til uppskot frá tveimum kommunulæknum á tingi um at herða fosturtøkulógina – m.a. við at seta eitt serligt toymi at veita ráðgeving til kvinnur, ið ynskja fosturtøku:

> *"Hvør skuldi verið nærri til at vurdera, um ein kvinna eigur at fáa abort, enn kommunulæknin (familjulæknin?) (um tað ikki má vera kvinnan sjálv?). Kommunulæknin kennir jú alla bakgrundina hjá kvinnuni og hennara nærmastu betýðiligt betur enn onkur 'fremmandur' psykiatari (sálarlæknin) í Havn. (...) Um abortlógin verður strangari, so verður resultatið, sum altíð – at tað gongur út yvir tey veiku í samfelagnum."*
>
> Karl Johan Fosså, kommunulækni, Dimmalætting 2. mars 1999

Fleiri hefta seg tó við júst hetta: *vurderingina*. Fyri nógv tykist lóggávan tilvildarlig, og fólk halda at avgerðin um fosturtøku verður latin upp í hendurnar á kommunulæknum kring landið, heldur enn at lógin greitt ásetur, nær hon kann fremjast ella ikki. Myndin av einum "elastikki" er tí ofta brúkt at lýsa hesa støðu:

> *"Lógin um fosturtøku er sum eitt lastik, ið kann tambast. (...) Kvinnur kunnu fáa fosturtøku av sosialum og heilsuligum orsøkum, men tað er ógvuliga ymiskt, hvat læknar leggja í tað og tí er tað eisini tilvildarligt, hvør fær fosturtøku, ella ikki."*
>
> Jenis av Rana í viðmerking í samband við at ungmannafelagið SU vil hava fría fosturtøku í Føroyum.
> www.in.fo – 09. August 2018

Um føroyska lógin um fosturtøku verður fylgd ella ikki er trupult at meta um. Kanningin í hesum faldaranum vísir greitt, at umleið ein triðingur av føroyingum halda ikki lógin verður fylgd – ella í øllum førum vita um eitt ella fleiri undantøk. Á sama hátt hava vit gjøgnum árini fleiri ferðir sæð, at politikarar og vanligir borgarar hava gjørt vart við, at lógin antin ikki verður fylgd, ella at hon er tilvildarlig – sum "eitt elastikk, sum kann tambast".

Tá tað er sagt, skal mann eisini minnast til, at lógin leggur upp til, at *læknar skulu gera eina meting*, og at hendan metingin so er avgerandi fyri, um kvinnan fær loyvi at fremja fosturtøku ella ikki. Lóggávan ger uppá tann mátan spurningin um fosturtøku enn meira fløktan, eftirsum hon leggur upp til eitt ávíst rásarum fyri tulking. Tí er spurningurin: hvussu heldur mann eina so ógreiða lóg? Og kann man í heila tikið lóggeva greitt um viðbrekna fosturtøkuspurningin? Møguliga verða hesi evnini í komandi kapitlum í føroyska fosturtøkukjakinum.

*"Í Føroyum heimilar lógin at beina fyri frískum barni, tá ið vandi er fyri móðurini. Eingin sigur, tað skal standa um lív, ella hvussu álvarsligur vandin skal vera fyri móðurina. Mangan er hetta "elastikk" brúkt, og kvinnur hava bara sagt seg gerast svakar, ella fáa lívið spilt, um barnið ikki verður tikið. So tað er mest upp til, hvussu liberalur læknin er viðvíkjandi fosturtýning."*

Erla Berghamar, lesarabræv í Dimmalætting 27. februar 1996